gult cyan magenta svart

DAGSINS MEINING

B‡rá›sforma›ur fyri øll

Eftir øllum at døma hevur høvu›ssta›urin fingi› n‡ggjan b‡rá›sformann, tá bla›i› er fari› til prentingar. Ta› ver›ur Jan Christiansen úr Fólkaflokkinum. Vit vilja ynskja honum tillukku vi› hesum ábyrgdarsessinum og vóna, at hann fer at røkja starvi› sum b‡rá›sforma›ur eins vir›iligt og tvørpolitiskt sum undanfarni b‡rá›sforma›urin, Leivur Hansen úr Tjó›veldisflokkinum hevur gjørt ta› nú í f‡ra ár.

Hóast talan er um tveir borgarligar flokkar, sum nú hava gjørt av at mynda meirilutan í b‡rá›num í Havn, so eiga vit ikki at gloyma, at partapolitikkur eigur ikki at ver›a ta› altavgerandi í komandi menningini av b‡num. Eftir okkara tykki var ta› ein ærlig og skilagó› roynd, sum umbo› Javna›arfloksins Tórfinn Smith tók, tá hann kalla›i allar b‡rá›slimir til fundar fyri at vita, um man kundi fáa eina heilt brei›a samgongu í b‡rá›num, sum kundi arbei›a fyri allar borgararnar í b‡num heldur enn bert fyri møguligum partapolitiskum áhugamálum.

Ta› skal vera vón okkara, at n‡ggi b‡rá›sforma›urin fer at bera sítt n‡ggja starvsheiti vir›iliga, solei›is at hann fer at virka sum arbei›sgevari hjá øllum borgarum í høvu›ssta›num uttan mun til flokspolitiskan lit. Ta› eigur at vera munur á at reka valstrí› fyri sín flokk og so brádliga at gerast hægsta umbo› fyri allar borgarar í b‡num. Vit ynskja honum gó›a eydnu vi› tí álitisstarvi hann hevur átiki› sær at røkja áhugamálini hjá øllum borgarum í kommununi.

Í næststørstu kommununi, Klaksvík, er enn eingin n‡ggjur b‡rá›sforma›ur funnin. Her tykist strí›i› at standa millum Tjó›veldisflokkin og Javna›arflokkin. Tjó›veldisflokkurin, sum hev›i størstu framgongdina vi› vali›, heldur seg eiga b‡rá›sformannin, men Javna›arflokkurin, sum eisini hev›i eitt gott val, er brádliga vor›in tungan á vágskálini og ger tí eisini krav uppá formanssessin. Eftir okkara tykki hev›i ta› veri› eitt gott val at givi› Ey›gunn Samuelsen úr Javna›arflokkinum møguleikan og hei›urin at ver›i› b‡rá›sforkvinna komandi f‡ra árini. Ta› hev›i veri› ein sunn broyting í okkara annars mansdominera›u ver›. Og ger kann Fólkaflokkurin koma at hava ein t‡›andi leiklut. Spurningurin kann lættliga gerast, hvønn Fólkaflokkurin ynskir sum b‡rá›sformann, ein tjó›veldismann ella eina javna›arkvinna. Ein margháttlig stø›a hjá Jógvan vi› Keldu at vera komin í.

Eisini á Tvøroyri ver›ur nú dúgliga fundast um, hvør skal sita vi› valdinum komandi skei›. Javna›arflokkurin hev›i eitt sera gott val, og tí heldur hann ta› vera náttúrligt, at hann fær b‡rá›sformannin. Men eins og í Klaksvík eru eisini her fleiri møguleikar. Hvør enn fær sessin, so eigur hann at minnast, at sum b‡rá›sforma›ur er man umbo› fyri allar íbúgvar í kommununi og ikki bert fyri teir, sum vald seg ella flokk sín. Hvar vit enn eru í landinum, so er ta› eitt minstakrav til b‡rá›sformannin/kvinnuna, at vi›komandi skal umbo›a allar borgarar og ikki bara ávís partapolitisk áhugamál.

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI



Flemming Samuelsen 70 ár

Í morgin fyllir Flemming Samuelsen, Flemming á Dimmalætting 70 ár. Flemming hevur sligi› sítt navn rimmarfast í bla›heiminum, sí›an hann sum hálvvaksin kom úr Fuglafir›i til Havnar í læru sum prentari hjá pápabeiggjanum G.L. Samuelsen á Dimmalætting.

Flemming hevur meginpartin av lívslei› síni havt ábyrgdina av tí prentlistarliga á Dimmu og í hesum drúgva skei›i hevur hann uppliva› meira enn nakar annar í prentfakinum. Ikki bara sum prentari, men eisini sum bla›ma›ur, onkuntí› sum yngri.

Tá hann kom á Dimmalætting var prentútger›in líti› broytt sí›an Dimma byrja›i í seinnu helvt av nítjandu øld. Tá Flemming leg›i frá sær herfyri, handa›i hann n‡ggju monnunum eina prentsmi›ju, sum fylgir vi› tí›ini og har einasta manuella arbei›i› er at bera svertu, tilbúgva og seta plátur í rotatiónspressuna og sjálvsagt at bera pakka›u blø›ini út í bilarnar, sum syrgja fyri at fáa blø›ini til lesarar gjøgnum post og á annan hátt. Alt anna› er elektroniskt, undantiki› teir tíggju fingrarnir hjá tí einstaka, sum skapa verki›.

Flemming er anna› enn Dimmalætting. Hann er eisini ein framúr gó›ur felagsma›ur og hann hevur veri› virkin alt lívi› í frítí›ini. Vit kenna øll bleytu rødd hansara í útvarpinum. "Hann rann sær kátur upp um heyg." "Ein skorlitt kúgv..." og so ví›ari. Vit kenna hann frá útvarpsleikum samam vi› Benny, bró›ur og G. L. Samuelsen og øllum hinum. Vit kenna hann frá Sjónleikarhúsinum og havnamenn kenna hann frá Klubbanum. Seinnu árini er hann eisini farin at velta Hoyvíkshagan vi› golfkølluni. Eitt n‡tt og spennandi ítrív.

Flemmingi ver›ur ynskt blítt lívsheyst og tillukku vi› degnum.

je

Emil 85

Mánadagin fyllir Emil Juul Thomsen 85 ár. Og Emil sleppir ongin føroyingur uttan um, tá velst um bøkur. Ongin einstaklingur hevur framt so stórt mentunnaravrik sum forleggjari sum Emil. Og hansara bókad‡rgripir standa at kalla í hvørjari stovu í landinum.

Fyri umlei› 30 árum sí›an leg›i hann til brots vi› at endurútgeva 32 árgangir av bókmentaritinum Var›anum. Fólk kundu tekna seg so hvørt sum bindini komu út og spenningur var hvørja fer› ein av hesum brúnu pakkunum vóru í væntu. Sí›an helt hann á fram og fóru undir at endurprenta útseldar útgávur og n‡ggjar útgávur eisini. Hann eigur m. a. hei›urin fyri, at vit fingu okkara mæta skald, William Heinesen á føroyskum.

Bókaútgáva er ikki bara pengar í Føroyum og tí skal nógv idealisma til fyri at geva bøkur út. Emil er hugsjónarmaur um ein háls og fyri kortum leg›ist enn ein leggsteinur at stóra Var›anum hjá Emil. Hann hevur givi› út Føroya, sum leingi hevur veri› á prenti, men sum bert hevur veri› tøkt hjá teimum heilt fáu.

Emil hevur árræ›i og tú veit ongantí› nær hann er li›ugur, tí skuldi ta› ikki undra um fleiri útgávur koma frá hansara hond.

Emil b‡r í Nólsoy.

Tillukku vi› degnum

je

Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri s‡nda samkenslu tá okkara elska›a mamma, vermamma, omma og langomma

Gerda Danielsen
Klaksvík

lá sjúk, anda›ist og var› jar›a›.
Takk fyri blómur og kransar, fyri peningagávur til Nor›oya Ellis- og Røktarheim, takk øll tit sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarsta› og til tykkum øll, sum á einhvønn hátt hjálptu til og s‡ndu samkenslu.
Ein serstøk tøkk til tykkum á Nor›oya Ellis- og Røktarheimi, sum so væl tóku tykkum av henni, ta› tí›, hon var hjá tykkum.
Harrin signi tykkum øll í komandi tí›um.

Familjunnar vegna

Erik, Helgi og Bjarni

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Sveinur Tróndarson sveinur@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta› mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Sjúkrahúsi› kann ongantí› gerast títt heim

SINNISBATI
Sunneva Háberg Eystursteinn

Tú kann ikki ver›a innlagdur heima hjá tær sjálvum. Almenni fundurin, i› Sinnisbati skipar fyri, á Landssjúkrahúsinum, ver›ur um stø›u teirra psykisk sjúku og bú›sta›armøguleikar teirra

Pallbor›sfundur, ver›ur í dag kl. 15.00, í veitsluhølinum á Landssjúkrahúsinum. Evni› á fundinum, er »Stø›a teirra psykisk sjúku og bú›sta›armøguleikar teirra«, og ver›ur hetta um vi›urskiftini á sjúkrahúsinum. Evni› hevur veri› vi›gjørt í fjølmi›lunum og í løgtinginum seinastu tí›ina, og trupulleikin í hesum, er at nógv psykisk sjúk fólk, hava haft psykiatrisku deildirnar sum bú›sta› í longri tí›. Tey kundu saktans flutt út úr sjúkrahúsinum, men vegna mangul av bú›stø›um, er ikki møguligt hjá teimum at flyta út, so at onnur kunnu ver›a løgd inn.

Svenning av Lofti, i› er nevndarlimur í Sinnisbata, greiddi frá, hvat i› tosa› ver›ur um á fundinum:

– Vi›urskiftini kundu veri› betur. Nú er so, at fleiri og fleiri i› eru psykisk sjúk, ver›a løgd inn á súkrahúsi›, men ikki er møguligt hjá teimum at fara út aftur at búgva. Ov fá bú›stø› eru, av tí, at ov líti› av peningi er. Tá ikki er møguligt hjá teimum psykisk sjúku at flyta út av sjúkrahúsinum aftur, er ei heldur pláss hjá teimum, i› skulu innleggjast, at ver›a innløgd. Alt er fult á sjúrahúsinum, hóast eini 25-30 kundu fari›, men tíverri er ikki møguligt.

– Ta› almenna hevur ábyrgdina at gera pláss, og á hesum øki eftirl‡sir Sinnisbati, ein mi›vísan landspolitikk og ítøkiligar, politiskar ætlanir á psykiatriska økinum. Fyrst í 90'unum, tá kreppan var, var› skipa› fyri sparingum. Hesar sparingar raka enn psykiatrisku deildirnar, og í ár eru 3 deildir stongdar av hesum. Tá ein deild stongdi, máttu sjúklingarnir flytast á næstu deildina, og tá hon stongdi, máttu sjúkligarnir aftur flytast. Hetta gerst ein stórur trupulleiki, og á fundinum fara vit at royna at fáa myndugleikarnir at síggja hvat trupulleikin er.

– Tá ein, i› hevur broti› beini, skal flytast frá eini deild til a›ra, er ikki naka› ræ›uligt í tí, men tá ein, i› er psykiskt sjúkur skal flytast, gevur ta› eina ringa stø›u. Sjúklingurin fær ófri› í sinni, og gerst óróligur. Umstø›urnar eru t‡dningarmiklar fyri ein psykisk sjúkan. Tá hann hevur veri› á eini stovu í eina tí›, er trupult hjá honum at brádliga skula venja seg vi› naka› anna›. Endamáli› á fundinum, er at seta ljóskasti á alt hetta.



Svenning av Lofti

Luttakarar ver›a: Helena Dam á Neystabø›- landsst‡risma›ur, Sofus Joensen- psyk. yvirlækni, Ey›un Joensen- psykologur, Magnus Isaksen- sosialrá›gevi, Jákup Foldbolei›ari á serforsorgini, Dánjal Petur Højgaard- kommunulækni, Marin Samuelsen- sjúkrasystir, Svenning av Lofti og Ásla Svensson- nevndarlimir í Sinnisbata. Høvi› ver›ur at seta spurningar til teirra.

Søguligar bøkur

Tríggjar av bókunum eru søguligir tekstir ella samrø›ur, sum eru savna› í bók, me›an sjónleikurin um Nólsoyar Páll er n‡ggjur. Hetta eru f‡ra spennandi og søguligar bøkur, sum Fannir á hesum sinni letur úr hondum

BÓKAÚTGÁVUR
Stefan í Skorini

– Ta› hevur veri› ómetaliga spennandi at arbeitt vi› hesum útgávunum. Hesufer› eru ta› tó onnur, i› hava tiki› tey stóru tøkini, sigur Árni Dahl.

Steinbjørn B. Jacobsen hevur skriva› leikin um Nólsoyar Páll, og hetta er kanska tann mest merkisverda bókin, sum Fannir gevur út í ár.

Steinbjørn sigur, at hann hevur roynt at hildi› seg til søguna, men at hann sjálvandi hevur veri› noyddur at skapa persónar kring Nólsoyar Páll.

Áhugin hjá Steinbirni fyri Nólsoyar Pálli stavar frá Sandvík, har hann hoyrdi abba sín siga frá um Páll. Her hoyrdi Steinbjørn eisini søgurnar um, hvussu Páll var› skotin vi› skipi sínum sunnanfyri Sumba, og at ymiskt rak í land av skipinum.

Hetta er ikki fyrstu fer›, at Steinbjørn skrivar um Nólsoyar Páll, tí hann hevur skriva› barnabókina Lílti Páll í Nólsoy, sum eisini er um Nólsoyar Páll.

Rúgvismesta bókin er "Streingir, i› tóna". Hetta er tri›ja bókin í rø›ini av ritverkum Símunar av Skar›i. Turi› Sigur›ardóttir hevur ritstjórna› bókini.

Í hesi tri›ju bókini kann lesast um skald og skaldskap, mál og uppl‡sing, mentan og politikk, lestrar, kvø›ur og ummæli.

Í fyrstu bókini vóru yrkingar eftir Símun av Skar›i, og í næstu bókini, sum kom í 1999, eru søguligar greinir og greinir um skaldskap og søgu.

Turi› Sigur›ardóttir hevur eisini ritstjórna› bókini "Vit skula sjálvir" eftir Jørgen-Frantz Jacobsen. 29. november í ár eru li›in hundra› ár, sí›an havnarma›urin Jørgen-Frantz var› borin í heim.

Hetta eru greinar, i› Jørgen-Frantz hevur skriva›, og sum hava sta›i› í Tingakrossi í árunum 1925-36. Eisini eru greinar úr Politiken.

Stuttligt er at lesa greinarnar eftir hesum evnagó›a rithøvunda og gløgga eyglei›ara.

Fjór›a bókin hjá Fannum er "Me›an løtur lí›a". Bókin er útskrift av útvarpssendingum, sum Marianna Debes Dahl hevur skipa› fyri.

Sendingarnar vóru 28 í tali, og hetta vóru brotamyndir úr gerandisdegnum tí›liga í tjúgundu øld. Marianna festi á band prát vi› fólk, sum eru fødd millum 1906 og 1924. Hvør sendingin var um eitt ávíst evni, og ikki eitt prát vi› einstakan persón.

Í bókini eru 45 forkunnugar myndir frá fyrra parti av hesi øldini.